**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1020**
**Tíðarskeið 3/6-8/6-2010**

---

**Fólk frá Havstovuni.:** Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum og at seta streymmátarar út. Eisini skuldu nakrar CTD-støðir takast í Vágahavinum og ein skurður við thermistor-veirinum.

**Reiðskapur:** Útgerð at seta fortoyningar út við, SeaBird-CTD, Thermistorketa.

**Um túrin:** Vit fóru út hóskvøldið 3/6 kl.2100. Siglt varð norðurum, norður til NWNA, sum varð sett út í øllum góðum. Vit hildu so áfram norðureftir og settu út ávikavist NWNE, NWNB og NWNG, allar komu út uttan trupulleikar.
Vit sigldu so á Havnina eftir eini rammu
Av Havnini varð siglt í eystara kant á Munkagrunninum, har vit settu eina rammu út NWSX og so fortoyningarnar NWSY og at enda NWSC í Hetlandsrennuna.
Haðani sigldu vit vestur í Bankarennuna har ávikavist NWFC og NWFB vórðu lagdar út.
Á veg inn tóku vit nakrar CTD-støðir eftir einum skurði yvir rammuni FASB í Vágahavinum.
Her varð Thermistor-veirurin so sleipaður, eisini yvir somu rammu, men hin vegin.
Tá hetta var liðugt, varð siglt á Havnina.
Vit vóru aftur á Havnini sunnumorgunin 6/6 kl.0300.

**Prøvataking:** Settu 9 standard fortoyningar út. Tóku fimm CTD-støðir. Tóku ein skurð við thermistorketuni.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir frá CTD-støðini verða lisnir í heyst.

**Viðmerkingar:**

11-06-2009 ________________________
Regin Kristiansen

Vend




Støðir og kósir á túri 1020